Prógv

Tove Thomsen, Tórshavn hevur á Sjúkrasystraskúlanum við Árhus Universitet lokið prógv í »Sygeplejefagligt Diplomstudium« við sergrein innan leiðslu.

BINGO

verður í KFUK
mánakvøldið
kl. 19.30

KFUK

Fulltrúi

Eitt starv sum fulltrúi við Stiftsstjórn Føroya er leyst at seta sum skjótast.

Arbeiðstíðin er 12 tímar um vikuna, og verður hon skipað í samráð við biskupin.

Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv.

Arbeiðsøkið fevnir um skipan og leiðslu av dagliga arbeiðinum á stiftsfyrisitingini, og fulltrúin hevur skyldu til at vera løgfrøðiligur ráðgevi hjá biskupinum í málum, sum viðvíkja embætisrakstri prestanna, kirkjuráðsvali, kirkjubókføring, nýtslu av kirkjum v. m.

Starvið verður lønt samsvarandi sáttmála við Danmarks Jurist- og Økonomforbund.

Umsókn við gjølligum upplýsingum um útbúgving og yrki higartil við prógvskjølum skulu stílast til Kirkeministeriet, Frederiksholms Kanal 21, 1220 København K., og sendast til Stiftsstjórn Føroya, J. Paturssonargøtu 20, Postrúm 8, 110 Tórshavn.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til hans J. Joensen, tlf. 11995.

Umsóknarfreistin er úti 5. juli 1991.

Stiftsstjórn Føroya
J. Paturssonargøta 20
Postrúm 8
110 Tórshavn

Tíkatáttur

Lag: *Úr Kvívik hoyrdist sjongur*

Hoyrdu tit um Nonnu
ta tikina hjá Honnu.
Av gessi gekk hon kyk.
Í friði vil ei liggja,
so Hanna noyðist byggja
um hana garð og stik.
Og Hanna kann jú einki við tað gera.
Men Noomi heldur hyggjuráð tað vera
á Griff — tann tollara — at fokusera.
So vist í heim man Nonna hvølpar bera.

So prúður og so førur
er Griff — men harrin tvørur,
hann sigur kortanei.
Hann hevur nógv at gera,
og heldur tvætl at vera.
Men Noomi kennir leið.
»Eg fari bert í figgjarmálaráðið,
so ivaleyst eitt loyvi har eg fái,
so hesin flotti Griff — av Harrans náði —
kann lata Nonnu fáa part av sáði.

Tað krevst jú ei tað nógva
at yvirtala Jógvan.
Tað er so sára lætt.
Á landastýrisfundi
hann talar fyri hundi,
sum fáa má sín rætt.
Og Jógvan heldur stóra synd tað vera,
at øll her skulu vera so forherðað.
»Vit mugu tað í bandi so at bera,
at Griff kann sleppa Nonnu glaða gera.«

Ei meira kvøða vil eg.
Men hvussu verður skilið,
um hetta heldur fram?
Man landið kunna bjargast?
Ei sørt at onkur argast.
Teir eiga ikki skamm.
Av tikagessi landið nú skal stýrast.
Summi gráta, meðan onnur smírast.
At landsstýrið av slíkum skal forstýrast.
Tað má av sonnum hundaliv jú skírast.

Edvard



Tvangsauktion

På dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn afholdes

Torsdag den 20. juni 1991 kl. 9.30

tvangsauktion over Saltfiskahúsið, stående på lejet grund, der er et umatrikuleret areal (arealet fremgår af tegning nr. 7729 fra Landsverkfrøðingurin), beliggende p² havnen i Haldórsvík, tilhørende P/f Stakkur.

Auktionen er begæret af Føroya Banki v/ Advokatskrivstovan.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokatkontor.

Auktionsdokumenterne lgger til gennemsyn på dommerkontoret.

Færøernes fogedret, den 03.06.91
Lasse S. Christensen, fm.

HÚSAGLUGGIN



Gluggin til ta føroysku familjuna. Sera smidligur og lættur at handfara. Ramma, karmur og beslag 100 mm breitt. Stødd eftir ynski.

Tilboð givið óbindandi. Biligari og betri

FØROYA GLUGGI

vindeygu
uthurðar
altanhurðar
skjúthurðar
viðtøkur
Windsor dørk

370 Miðvágur · Tlf. 32411 · Telefax 33073

sosialurin · sosialurin · sosialurin · sosialurin · sosialurin · sosialurin · sosialurin

Ja! Eg gerist haldari av Tíðindablaðnum Sosialinum og fái blaðið **5 ferðir um vikuna.**
Haldaragjaldið er kr. **200,**- fyri ársfj.
Haldarar uttanlands gjalda kr. **235,**-/ársfj.
Goldið verður ongantíð fyri fleiri bløð enn tey, ið eru eftir at koma í einum ársfjórðingi.

Navn: _____

Bústaður: _____

Bygd/býur: _____

Kannað postverkinum

Okeypis Sosialurin rindar postgjaldið

64

tíðindablaðið sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

sosialurin · sosialurin · sosialurin · sosialurin · sosialurin · sosialurin · sosialu